# Søguligar filmsverkætlanir



## Uni Leitisstein Hansen hevur eitt sjáldsama spennandi arbeiðslív. Arbeiðsumhvørvið úti á Nordisk Film í Valby angar av søgu og skapandi list

### Samrøða



**Heri Simonsen**
heri@sosialurin.fo

Danir eiga elsta heimsins elsta filmsfelag, "Nordisk Film", sum liggur úti í Valby, norðanfyri Keypmannahavn. Filmsfelagið varð stovnað í 1906, og hesi 103 árini hava borgað fyri minniligum films- og sjónvarpsfilmsætlanum. Filmsrøðin hjá Nordisk Film, sum føroyingar hava størstan alsk til, er uttan iva røðin um Olsen-bandan. Tíbetur hava vit føroyingar hildið okkum til at síggja donsku upprunarøðina. Svenskarar og norðmenn keyptu handritið frá Nordisk Film í sínari tíð, og fóru í holt við at framleiða ávikavist "Jønsson Ligan" og "Olsen-banden" við identiskum handritum, men norsku og svensku sjónleikarnir klára ikki at koma upp á ótrúligu listarligu hæddirnar hjá Ove Sprogøe, Poul Bundgaard, Morten Grunwald, Kirsten Walther og øllum, sum leiktu við í danska Olsen-bandanum. Sjáldan hevur ein filmsrøð megnað at rikið so nógv fólk í Biograf-høllirnar. Heilar tríggjar ferðir kom tað fyri, at filmar við Olsen-bandanum seldu meir enn eina miljón atgongumerki í Danmark. Olsen-banden ser rødt (1976): 1.201.145 seld atgongumerki. Olsen-banden deruda' (1977): 1.044.787 seld atgongumerki. Olsen-banden går i krig (1978): 1.005.753 seld atgongumerki. Taka vit sjónvarpsrøðirnar Nordisk Film hevur framleitt, so kemur ein ikki uttan um "Matador" hjá Erik Balling, sum eisini leikstjórnaði filmsrøðina við Olsen-bandanum. Teir 24 partarnir í sjónvarpsrøðini, Matador standa, sum ein varði í donsku sjónvarpssøguni, og eru saman við Olsen-bandanum, uttan iva hæddarpunktini í søguni hjá Nordisk Film. Eisini í hesum søguríka og hugnaliga arbeiðsumhvørvinum finnast tað føroyingar. Uni Leitistein Hansen arbeiðir hjá Substanz Film, sum er eitt filmsfelag, sum Nordisk Film eigur helvtina av.

### Drotningin til arbeiðis

Uni Leitisstein Hansen tekur ímóti mær í móttøkuni hjá Nordisk Film. Uni og Substanz Film hava í góðum samstarvi við Eik Banka, verið við til at bjarga einum týdningarmiklum parti av Føroya søgu, við filmsverkætlanini "Føroyskar Søgur". Ein sjónbandsfløga, sum mangir føroyingar hava ognað sær, og fegnast um. Uni vil kortini fyrst vísa mær søguligu bygningarnar, sum hava staðið í Valby, síðani byrjanina í 1906, og sum enn eru í nýtslu. Fyri stuttum hava tey í Nordisk Film havt eitt serligt starvsfólk, nevnliga Margrethu drotning, sum er tiltikin dugnalig, tá tað kemur til at seyma búnar, og at gera kulissur. – Tað er ógvuliga serstakt at sita og eta máltíðar saman við drotningini fleiri dagar á rað. Uni undirstrikar hvussu spennandi arbeiðsplássið er. – Drotningin er tó ikki eitt fólk tú bara fert upp til, og byrjar at tosa við. So hevði hon neyvan fingið nógv arbeiðið frá hondini. Vit vóru pent biðin um at verða diskrét, og tað eru fólk von við her úti. Tí her koma so nógv kend fólk út á Nordisk Film, bæði í tíð og ótíð. Uppgávan hjá drotningini var at gera scenografiina – kulisirnar – til ein film, sum varð framleiddur her úti. Og hon var heilt einfalt til arbeiðis her úti. Uni hevur syrgt fyri, at drotningin hevur fingið eitt eintak av filmsfløguni "Føroyskar Søgur", har hon kann m.a. kann síggja Føroya-vitjanir hjá sínum forfedrum. – Her er eitt gott umhvørvi fyri fólk, sum arbeiða við kreativum tingum. Sjálvandi, tá Jan Gintberg hevur sitið og flent eftir sínum egnu skemtisøgum í fleiri dagar á rað, so blívur tað ikki við at verða stuttligt. Men tað er so her tað hendir, um tú ert áhugaður at arbeiða innan filmsídnaðin. Tað triviella kann eisini spøkja í tí kreativa umhvørvinum.

### Elstu leikpallar í Heiminum

Vit spáka runt í filmsbýnum hjá Nordisk Film. – Her sært tú ein leikpall. Sigur Uni entusiastiskur. – Hetta er helst elsti leikpallur í Heiminum. Sjálvir halda vit í Substanz Film til í einum av teimum elstu bygningunum, sum er á staðnum. Vit trína innar í gamla bygninginum við teimum gomlu leikpallunum, rekvisittunum, leikbúnunum, og teimum ellugomlu films-upptøkutólunum. Eitt tað fyrsta eygað ber við, er ein gamal rullistólur, og Uni staðfestir hvønn rullistól talan er um: - Hetta er so rullistólurin hjá Tante Møhge frá Matador. Eg síggi tað gomlu frammanfyri mær: - Kør så Misse! Skamt frá rullistólinum eru fýra leikbúnar, sum fáa eitt stórt smíl fram hjá undirritaða. Talan er um klæðini hjá Egon, Benny, Kjeld og Yvonne. Sum ein filmur koma tær stuttligu løturnar fram fyri mær. Egon avgjørdur við sigarini í munninum: - Jeg har en plan! Benny, sum fer upp á flákra og sigur: - Skidegodt Egon. Yvonne sum skeldar: - Altså ved du nu hvad Egon. Tríggjar av teimum fýra legendunum eru farin foldum frá, men serligu búnarnir standa eftir í hesum gamla bygninginum, sum ein minnisvarði yvir nakað, sum bæði er glæsiligt og stuttligt. Aðrir filmssøguligir leikbúnar eru eisini at finna í bygninginum, m.a. búnarnir hjá teimum fínu damunum í Matador. Á vegginum eru fleiri filmssøguligar myndir, á tí einu fotomyndini sæst, at Nordisk Film royndi seg við einum filmi um "Titanic", stutt aftaná, at skipið sakk í 1912. Millum hinar myndirnar frá 103 ára gomlu søguni hjá Nordisk Film, er ein mynd av høvuðsgøtuni í Korsbæk frá Matador-røðini.

### Millum Heimsins fremstu

Frá byrjanini í 20. øld var Nordisk Film millum størstu filmsfeløg í Heiminum. Fyrstu 23 árini hjá Nordisk Film, vóru í tíðini, tá stummfilmurin ráddi. Ikki fyrr enn í 1929 tóku talufilmarnir yvir. Danska filmssjónleikarainnan, Asta Nielsen varð heimsgitin, báðumegin fyrra veraldarbardaga. Tá vóru filmarnir bornir av tí dramatiska og visionela. Ikki var neyðugt at leggja sær orðini á enskum, fronskum ella týskum, og tóku Asta Nielsen og Nordisk Film av hesum møguleikanum. Ein annar danskur filmssjónleikari, sum varð nógv frammi í stummfilmsárunum, var Harald Schjønberg. Uppi á loftinum í tí søguliga bygninum við øllum teimum søguligu lutunum, er møguleiki hjá fólki at bíleggja sær eina spennandi máltíð í einum filmssøguligum umhvørvi. Á hesum loftinum eru filmstól og filmsframvísarar, sum eru aldargamlir. Eitt leikumhvørvi,

Sosialurin